VÍF-Neistin 25-21 (14-12)

# Orkan rakk ikki

**Stóran part av dystinum hevði Neistin gott tak á VÍF, men seinastu løturnar av báðum hálvleikunum tóku vestmannagenturnar alt aftur**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað, sum frammanundan helst varð mett sum mest óspennandi av teimum fýra hálvfinalunum í Coca-Cola kappingini, vísti seg mikukvøldið at gerast tann mest spennandi dysturin higartil.

Bæði stigatalvan og innanhýsis úrslitini í landskappingini høvdu annars boðað frá, at tað var ikki nógv, sum neistakvinnurnar kundu gera mótvegis teimum hjá VÍF. Hinvegin hevur tað nú í endaspælinum verið stór framgongd at síggja á neistaliðnum, og tí var tað kanska við góðum vónum, at farið varð til Vestmanna.

## VÍF dró seinastu løturnar

Tað skuldi eisini vísa seg, at Neistin hevði nakað at hava góðu vónirnar í. Fyrstu 20 minuttirnar av dystinum vóru tær greitt omaná, og eitt skifti var leiðsla teirra 11-7. Seinastu løtuna undan steðginum fekk VÍF tó vent støðuni, solieðis at tær vóru tvey mál frammanfyri, tá farið varð til hálvleik.

Í seinna hálvleiki helt munurin sær at kalla alla tíðina. Onkuntíð hevði Neistin hug at toga seg inn, men hvørja ferð megnaði VÍF at svara aftur. Tá tíggju minuttir vóru eftir, var munurin komin niður í eitt mál, men aftur her sýndist VÍF at vera drúgvari seinastu løtuna, soleiðis at tað at enda vóru fýra mál á muni.

Ein munur, sum kann vísa seg at vera nóg mikið hjá VÍF, men sum hinvegin eisini ber boð um, at tað avgjørt ikki verður nøkur løtt uppgáva, tá tær aftur hitta Neistaliðið um eina viku.

Til tann dystin vóna tær í Vestmanna helst, at Sóleyð Mikkelsen aftur verður tøk. Hon sat á beinkinum allan dystin mikukvøldið, men varð tó ikki mett at vera nóg birg til at átaka sær ein leiklut inni á vøllinum.

## Mistu í yvirtali

Ein av orsøkunum til framgongdina hjá Neistanum er uttan iva, at Katrin á Neystabø aftur er at síggja á liðnum, og hóast tapið mikukvøldið, so lat hon hampuliga væl at dystinum.

- Tað gekk betri hjá okkum, enn tað hevur gjørt í fleiri øðrum dystum, men tað kendist tó, sum um vit ongantíð fingu ordiliga fatur á teimum, eftir steðgin. Fyri okkum var tað eisini ótrúliga keðiligt, at vit søplaðu eina trygga leiðslu burtur undan steðginum, og tí gjørdist seinni hálvleikur eisini tungur, segði Katrin um dystin.

- Avgerandi løtan var tó helst, tá vit í yvirtali ikki megna at javna (støðan var tá 19-18). Ístaðin sleppa tær longur frá okkum, og hetta merkti nógv sálarliga hjá okkum

- Tað er kanska tað, at tær í ár hava verið vanar við at vinna, meðan tað ikki hevur gingið so væl hjá okkum, og at hetta kemur til sjóndar í avgerandi løtunum, segði Katrin á Neystabø at enda.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
VÍF: Iona Rápa 9(4), Nicoleta Radu 6, Fríða Marjunardóttir 3(1), Alis Høghamar 2, Nicolina Eyðbjørnsdóttir 2, Jacklin Durhuus 2, Randi Kúrberg 1
Neistin: Katrin á Neystabø 9, Annika Thomsen 5(4), Súna Mørk 3(1), Birita Wardum 3, Mildrid Jacobsen 1




*VÍF fekk harða mótstøðu, men tær megnaðu tó at vinna við fýra málum móti Neistanum, og hava tí ein hampuligan fyrimun undan seinnu hálvfinaluni*

Brotskøst: VÍF 7, Neistin 7
Útvísgingar: VÍF 1, Neistin 5
Dómarar úr StÍF: Jústines Justinussen og Poli Hansen

# Kvinnurnar í gongd

**Landsliðsvenjarin, Álvur Hansen, hevur sent boð eftir fremstu kvinnluleikarunum í landinum, sum nú fara undir úttøkuvenjingarnar**

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Fyri fyrstu ferð skal føroyska A-landsliðið í kvinnufótbólti royna seg á oyggjaleikunum, og fyrstu venjingarnar til hetta verða komandi sunnudag.

Álvur Hansen, landsliðsvenjari, hevur sent boð eftir 28 leikarum til fyrstu úttøkuvenjingina, har leikararnir eisini fáa at vita, hvussu venjingarnar hjá landsliðnum verða skipaðar framyvir.

Tær 28 eru: Annika Hansen, Annika Godtfred, Eyðvør Thomsen, Silja á Borg, Eyðfríð Kristiansen, HB, Vivi Andreasen, Ragna Andreasen, Jensia Sirdal, Paula Mikkelsen, Vivian Bjartalíð, Malena Josephsen, Rannvá Andreasen, Bára Skaale, KÍ, Maria Vang, Sólgerð Vidoerø, Sólvá Joensen, Elsebeth Jónsson, B36, Rini Mørk, Rannvá Augustinussen, Halltóra Joensen, Guðrun í Lágabø, VB, Oddvá Kristiansdóttir, Irdi Hansen, Elinbjørg Hammer, NSÍ, Heidi Jacobsen, GÍ, Elin Højsted, B71, Eyðvør í Dímun, B1921, Helga Ellingsgaard, Frederiksberg Boldklub.

## Strævin skrá

Umframt Álv Hansen er eisini Jón Harald Poulsen knýttur at landsliðnum, og ikki kann sigast annað enn, at teir báðir hava eina strævna skrá fyri framman.

Ikki færri enn 16 landsliðssavningar eru á skránni á kalendaranum, sum leikararnir hava fingið útflýggjað, og av hesum er talan í fleiri førum um vikuskifti, har venjingarnar helst verða fleiri í tali.

Einki er tó at ivast í, at nógv og miðvís venjing skal til fyri at røkka einum góðum úrslitið. Higartil hava avbjóðingarnar hjá landsliðnum verið sera spjaddar, og tí er hópurin helst ikki so samansjóvaður, sum ynskiligt kundi verið, men hetta tykist so vera nakað, sum venjararnir ætla sær at broyta.

VÍF-Kyndil 32-20 (14-9)

# Eingin dramatikkur í klassikaranum

**Eftir stórsigurin á Kyndli í fyrru hálvfinaluni tykist returdysturin bert at vera ein avgreiðsludystur fyri vestmenningarnar**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Grundað á einaveldið hjá VÍF í landskappingini hetta árið, tóktust treytirnar hjá Kyndli at vera greiðar undan hálvfinaludystunum ímóti VÍF. Skuldi talan gerast um gullmerki av nøkrum slag hetta árið, var neyðugt við einum samlaðum sigri móti vestmenningum.

Nú fyrra hálvfinalan er farin aftur um bak, tykist alt hetta tó at vera ørvitistos, tí VÍF lat ikki nakran sum helst iva vera um úrslitið, tá liðini bæði hittust í Vestmanna mikukvøldið.

## Vardu væl

Endaliga úrslitið gjørdist ein sigur upp á 12 mál. Ein greiður sigur, sum sambært venjarunum hjá liðunum báðum serliga varð grundaður á eina væl leikandi VÍF verju, sum kyndilsmenninir ongantíð fingu bilbukt við.

– Vit vóru noyddir at nýta alt ov nógvar kreftir í álopspartinum, og harumframt vóru teir eisini væl skarpari enn vit, so har var einki at tosa um, helt kyndilsvenjarin, Sophus Dal Christiansen, eftir dystin, og VÍF venjarin var heldur ikki ósamdur í hesum.

Hjalmar Klein Olsen, segði nevnliga um hetta, at ætlan teirra fyrst og fremst var at steðga Bjarna Wardum, umframt at ansa eftir fríspælingunum frá Jónleifi, og at hetta eisini var nakað, sum eydnaðist sera væl.

At talan var um nakran lættan dyst, soleiðis sum úrslitið annars kundi bent á, er Hjalmar tó ikki samdur í.

– Vit vóru alla tíðina á odda við nøkrum málum, og eg haldi eisini vit høvdu tamarhald á støðuni. Hinvegin, so eydnaðist tað okkum ongantíð at sleppa heilt leysir av teimum, fyrr enn seinasta korterið av dystinum, helt VÍF venjarin.

## Munur allan vegin

At VÍF hevur havt tamarhald á, er helt heldur einki at ivast í. Teir vunnu sær rættiliga tíðliga eina hampuliga trygga leiðslu, og hóast Kyndil síðani fekk hildið fast, so fór munurin ongantíð niður um trý mál.

Seinna umfarið øktu vestmenningar javnt og støðugt, og millum annað vóru teir á odda 30-16, tá einir fimm minuttir restaðu at leika.

Kyndil fekk tó pyntað nakað um úrslitið seinastu løtuna, men einki er tó at ivast í, at VÍF nú hevur meira enn hálvt annað bein í finaludystinum.

Fyri Kyndil ræður kanska mest um at vaska minnini um dystin av sær, áðrenn teir um vikuskiftið aftur skulu í eldin.

Kanska skulu teir eisini fínna rútmuna í spælinum aftur, soleiðis sum teir gjørdu tað undan jólasteðginum. Ein stegður, sum kanska hevuir verið ov drúgvur hjá Kyndli, sum ikki hevði eins nógvar leikarar sum vestmenningar í landsliðshópinum.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
VÍF: Ingi Olsen 12(5), Áki Olsen 7, Sámal Joensen 5, Petur Fr. Joensen 2, Johnny Joensen 2, Sjúrður Holm 2, Harald Bjørgvin 2, Martin Hummeland 1
Kyndil: Jónleif Sólsker 5(2), Uni Wardum 4, Hans Áki Dal Christiansen 4(2), Bjarni Wardum 3, Janus Einar Sørensen 2, Heini Bendtsen 2, Høgni Klein 1
Brotskøst: VÍF 5, Kyndil 5
Útvísingar: VÍF 7, Kyndil 5
Dómarar úr StÍF: Jústines Justinussen og Poli Hansen.



# Kasparov á odda saman við Shirov

**Níggjunda umfar bleiv eitt søguligt umfar hjá Alexander Morozevich og talvheiminum, tá hann sum tann fyrsti vann á Vladimir Kramnik síðani hesin bleiv heimsmeistari. Gary Kasparov vann somuleiðis sera týðandi dyst ímóti oddafiskinum Alexei Shirov, og hava teir nú eins nógv stig**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Týsdagin bleiv níggjunda umfar leikt í Wijk ann Zee, mikudagin var frídagur. Vegna evstamark hava vit ikki fingið úrslitini frá 10. umfar sum bleiv leikt í gjár.

Øll úrslitini týsdagin í toppinum fløskaðu seg ómetaliga væl fyri Kasparov. Hann vann á Shirov, meðan Kramnik sum hevði eins nógv stig, tapti ímóti Morozevich. Anand megnaði ikki at vinna á Leko, og Timman fekk somuleiðis javnleik ímóti Adams.

## Heilsaðu ikki uppá hvønn annan

Kasparov vildi ikki heilsa Shirov við lógvatakið undan talvi teirra, og orsøkin var at Shirov ikki vil geva Kasparov eina umbering fyri at hann, undan HM dystinum millum Kramnik og Kasparov í oktober, vildi vera við at dysturin var planlagdur soleiðis at kasparov skuldi vinna. Sum øll vita vann Kramnik dystin, og tá Shirov ikki vildi umbera seg fyri ákæring sína valdi Kasparov, fyri fyrstu ferð nakrantíð ífylgju honum sjálvum, ikki at heilsa mótstøðumanninum. Tískil varð lagt upp til ein sannan bardaga á teimum 64 puntunum.

Shirov legði út við russisku byrjanini, men valdi í miðspælinum at broyta taktikk, soleiðis at hann restina av talvinum vardi seg. Kasparov leikti væl, fekk góða støða og eisini eina sterka frífinnu djúpt inni í støðuni. Spakuliga pilkaði hann støðuna sundur hjá Shirov og avvikladi til ein vunnið rókaendatalv. Sera væl telvað av Kasparov, sum tilegnaði sigurin til pápa sín sum doyði á hesum degi fyri tredivu áðrenn síðani.

Heili 10-0 førir Kasparov í sigrum innanhýsis ímóti Shirov, umframt nakrir javnleikir sjálvsagt.

## Meistarin fall

Hvør skuldi trúð at Kramnik so skjótt eftir HM-heitið fór at tapa eitt talv, og aftrat við hvíta fólkinum. Tann nærum óyvirvinniligi Kramnik hevði annars nærum avgerandi fyrimun í miðspælinum, men valdi at avviklað til eitt ivasamt endatalv, har hann fór eftir skeivu planini. Morozevich fekk ofrað mann fyri finnur, sum viðførdi at hansara finnur ikki kundi steðgast. Kramnik roydni, men gavst skjótt eftir hetta offur.

Morozevich kom ájavnt Kramnik við sigrinum og liggja teir nú á deildum triðja plássi.

Støðan, nú níggju umfør eru leikt, sæst aðra staðni á síðuni.

Ringt verður at steðga Kasparov. Hann hevur møtt øllum teimum sterkastu undantikið Adams, sum hann møtir við hvítum í trettanda og síðsta umfari. Hinir verða hollendingarnir Piket, Timman og Van Wely. Shirov hinvegin manglar enn teir sterku, Kramnik, Anand og Morozevich.

Í gjár hittust millum annað Piket-Kasparov, Shirov-Anand og Topalov-Kramnik.

Í B-bólkinum er tætt í toppinum, har Gurevich (2694) liggur á odda. Bert hálvt stig aftanfyri kemur 13 ára gamli Teimour Radjabov, sum vit kenna frá 3rd Tórshavn International.

http://www.corusgroup.com/coruschess/home.html er almenna heimasíðan.



*Gary Kasparov tykist av hava lisið mótstøðumenn sínar rætt av hesaferð*

## Talvið hesa vikuna

Kasparov,G (2849) - Shirov,A (2718)
Corus2001 Wijk aan Zee (9), 23.01.2001

1.e4 e5 2.Nf3 Nf6 (Russisk byrjan) 3.Nxe5 d6 4.Nf3 Nxe4 5.d4 d5 6.Bd3 Bd6 7.0-0 0-0 8.c4 c6 9.Qc2 Na6 10.a3 Bg4 11.Ne5 Bh5 (júst hesa støðu hevur Kasparov djúpt analyserað, og er tí væl fyrireikaður) 12.cxd5 cxd5 13.Nc3! (Nýggjheit) Nxc3 14.bxc3 Kh8 15.f4 (Kasparov brúkti her nógva tíð, alternativið var sjálvsagt 15.Bxh7 g6 16.Fd2 við góðum spæli, men valdi ístaðin tað trygga) Bxe5? (Betri hevði verið f6) 16.fxe5 Bg6 17.a4! Qd7 18.Ba3 Rfe8 19.Bxg6 fxg6 20.Qb3 b6 21.Bd6 Nc7 22.Rf3 Rac8 23.Raf1 h6 24.Qc2! Qg4 25.Rg3 Qh5 26.Rh3 Qg5 27.Rg3 Qh5



28.Bxc7 (Avviklar til vunnið endatalv) Rxc7 29.Rxg6 Qh4 30.h3 Qxd4+ 31.cxd4 Rxc2 32.Rf7 (Nú vinnur hvítur lættliga. d5 finnan verður tikin, og hvítu sentrumsfinnurnar avgera talvið) Rg8 33.Rd6 Rc4 34.Rxd5 Rxa4 35.Rdd7 Ra1+ 36.Kf2 Ra2+ 37.Kf3 Kh7 38.e6 Kg6 39.d5 Rc8 40.Rc7 Re8 41.g4 a5 42.Rxg7+ Kf6 43.Rgf7+ Ke5 44.Rf5+ Kd4 45.e7 1-0

## Støðan

| | Name | | ELO | 1 | 2 | 3 | 4 | 5 | 6 | 7 | 8 | 9 | 10 | 11 | 12 | 13 | 14 | Score | TPR |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. | Kasparov | Rus | 2849 | X | 1 | _ | _ | - | _ | _ | _ | - | - | 1 | 1 | - | 1 | 6,5 | 2875 |
| 2. | Shirov | Spa | 2718 | 0 | X | - | - | _ | - | - | _ | 1 | 1 | _ | 1 | 1 | 1 | 6,5 | 2854 |
| 3. | Kramnik | Rus | 2772 | _ | - | X | 0 | _ | _ | 1 | - | _ | 1 | _ | - | - | 1 | 5,5 | 2785 |
| 4. | Morozevich | Rus | 2745 | _ | - | 1 | X | 0 | _ | 0 | - | _ | 1 | - | - | 1 | 1 | 5,5 | 2795 |
| 5. | Adams | Eng | 2746 | - | _ | _ | 1 | X | _ | _ | _ | _ | - | - | _ | _ | - | 5 | 2761 |
| 6. | Anand | IND | 2790 | _ | - | _ | _ | _ | X | _ | _ | - | - | _ | _ | - | 1 | 5 | 2761 |
| 7. | Ivanchuck | Ukr | 2717 | _ | - | 0 | 1 | _ | _ | X | - | - | _ | 1 | _ | - | _ | 5 | 2764 |
| 8. | Leko | Hun | 2745 | _ | _ | - | - | _ | _ | - | X | _ | 0 | _ | - | _ | _ | 4 | 2650 |
| 9. | Timman | Ned | 2629 | - | 0 | _ | _ | _ | - | - | _ | X | _ | 0 | 1 | _ | - | 4 | 2663 |
| 10. | van Wely | Ned | 2700 | - | 0 | 0 | 0 | - | - | _ | 1 | _ | X | _ | _ | 1 | - | 4 | 2652 |
| 11. | Fedorov | Blr | 2575 | 0 | _ | _ | - | - | _ | 0 | _ | 1 | _ | X | - | 0 | - | 3,5 | 2648 |
| 12. | Topalov | Bul | 2718 | 0 | 0 | - | - | _ | _ | _ | - | 0 | _ | - | X | 1 | _ | 3,5 | 2629 |
| 13. | Piket | Ned | 2632 | - | 0 | - | 0 | _ | - | - | _ | _ | 0 | 1 | 0 | X | _ | 3 | 2561 |
| 14. | Tiviakov | Ned | 2597 | 0 | 0 | 0 | 0 | - | 0 | _ | _ | - | - | - | _ | _ | X | 2 | 2523 |

# Dart



**Úrslit frá kapping, sum var um vikuskifti í neystinum hjá Havnar Róðrarfelag.**

Dartsambandið skipaði um vikuskifti fyri fimtu einstaklingakappingini í ár.

Í einmansleiki vóru 17 luttakarar. Í mun til seinastu kapping var stór útskifting millum teir, sum spældu seg fram til hálvfinaluna. Bæði Remy G. Hansen og Alvin Egholm, sum liggja heilt frammi í oddinum á styrkilistanum, vórðu slignir út í fjórðingsfinalunum; Remy í einum vælleiktum og sera jøvnum dysti, sum Henrik Pedersen vann 4-3.

Henrik møtti í hálvfinaluni sínum fasta makkara í tvímansleiki, Poul Poulsen. Hetta gjørdist eisini ein sera javnur og seigur dystur, har hvørgin vildi lúta. Tað endaði tó við, at Henrik vann 5-4.

Í hinari hálvfinaluni hittust eisini tveir fastir makkarar í tvímansleiki, Henning Thomsen og Petur Grønagarð. Teir fylgdust upp til 3-3, men Petur var kaldari í avgerandi løtunum og vann 5-3.

Finalan gjørdist enn ein vælleiktur dystur. Tað sá út til, at Henrik ætlaði sær gull, og hann var eisini á odda 4-2; men so raknaði Petur við og vann fýra tey næstu settini og harvið finaluna 6-4.

## Fá pør

Í tvímansleiki var uppmøtingin einki serlig. Einans 12 pør luttóku, og fleiri forføll gjørdu, at fleiri nýggjar samansetingar av pørunum vóru at síggja. Men hjá summum royndist hetta væl.

Henrik Pedersen/Poul Poulsen spældu seg sum vant trygt í hálvfinaluna. Har vunnu teir 5-2 á Jan Midjord/Henning Thomsen. Í hinari hálvfinaluni spældu Alvin Egholm/Sune Rasmussen móti Jónfinn Vestergaard/Regin Enghamar. Heldur ikki her var nakar ivi, Alvin/Sune vunnu 5-1; men Jónfinn og Regin vóru væl nøgdir við triðjaplássið eftirsum teir ongantíð áður hava spælt saman og Regin enntá bara var komin oman í neystið sum áskoðari.

Í finaluni vístu Henrik/Poul sera gott spæl, og tað var ongantíð nakar ivi um, hvør fór at vinna. Alvin og Sune skoraðu væl til tíðir, men ongantíð í senn, og tí gjørdist tað bert nokk til at vinna tað eina settið. Finalan endaði sostatt 6-1 til Henrik/Poul, sum síggja út til at vera meir tryggir enn nakrantíð á ovastu rók í tvímansleiki.

Føroya Banki læt steyp og heiðursmerkir til vinnararnar, sum allir síggjast á myndini.